gult cyan magenta svart

FØ‹INGARDAGSHEILSAN. Studentaskúlalærari og næmingar heilsa Ingálvi, senda honum eina myndaskrá og grei›a frá upplivingum á stórfingnu frams‡ningini í Listaskálanum

Gó›i Ingálvur!

Jens Frederiksen

Eg og næmingar mínir vilja á henda hátt ynskja tær hjartaliga tillukku vi› tí stóra degnum mánadagin.

At bera fø›ingardagsheilsanir er í sjalvum sær kveikjandi, tá man hugsar um at or›i› "heilsan" etymologisk sæ› er systir til "heilsu".

At vit solei›is, hvørja fer› vit "heilsa", eisini ynskja gó›a heilsu.

Og í tí sambandi komi eg at hugsa um ta› stóra avrik títt verk avmyndar og umbo›ar. Eitt verk sum bókstaviliga hevur kravt gó›a heilsu og styrki. Vi › stóru frams‡ningini í Skálanum í huga er ta› øllum ey›s‡nt, at hetta hevur kravt ikki bara vanliga gó›a heilsu, men mikla styrki - sjálvt um frams‡ningin hevur eina leikandi lættleika og stundum káta ávirkan á ásko›aran.

Fyri teg er ta› sjálvandi eina lukka at komu solei›is til árs, og í roynd og veru at lumpa "alderdommens molest", sum William Heinesens tekur til. Men ta› er eisini ein stór gáva fyri ásko›arafjøldina og føroya fólk, og ikki minst ungdómin, at tú hevur megi og dirvi til at dríva á.

Í okkara rótleysu tí›unum hoyra vit dag og dagliga um hvussu ney›ugt ta› er at hava tær røttu fyrimyndirnar. Her hevur fyridømi títt alstóran t‡dning.

Vit vita - og eg síggi ta› í minum yrki - at tey ungu eru ágr‡tin og taka alla ver›ina fyri seg sum arbei›søki og avbjó›ing. Ikki bert tá tey eru á netinum, men eisini tá ta› kemur til útbúgving. Innan listaver›ina kunnu vit t.d. hugsa um Rannvu Kunoy, sum er í London.

Ta› eg vil undirstrika er - og ta› haldi eg ofta ver›ur gloymt - at tú ongantí› hevur veri› leingi burtur frá málningum av sjúku, kreppu ella tí, at áhugin hjá móttakarunum hevur skorta›. Tískil eru vit sum ásko›arar í teirri hepnu stø›u, at standa framman fyri einum lívsverki uttan slit.

Ta› er sjálvandi ikki naka› tú beinlei›is hugsar um, ella hevur sum endamál - men vit pedagogar bruka oftani títt dømi! Tí ta› er næstan ógjørligt at mana í jør›ina ta romantisku fatanina av listini sum eitt ekstremt fyribrigdi, útint av meira ella minni sinnisjúkum málarum, hvørs avrik ver›a betri, jú fyrr teir doyggja (helst fyri egnari hond) ella eru proportionalt vir›ismiklir vi›, hvussu nógvar skandalur, ella avrivin oyru ein nú kann vísa fram.

Eg loyvi mær at enda hesar innlei›andi setningar vi› nøkrum or›um frá Karen Blixen, har hon nemur vi› aldur og avrik - og leggjast skal afturat, at verk títt, fyri at blíva í Blixen'sa vín-mynd, hevur fingi› d‡pd og bouquet: "Alderen er den største prøve for alle - ligesom med vin; det skal være en virkelig god vintage, som kan tåle at gemmes. Og ikke bare med mennesker, men fx ogsaa med Kunst. Den ringere Høst må man hellere drikke straks, uden illussioner, den kan dog altid gå ned. Men det virkelig gode - hvilken Charme og Værdi får det ikke ved at lagres. Så længe det er helt frisk, kan ingen mennesker virkelig vide, hvad det er værd; men efter 50 eller bare 30 år!"

"Hvat ynskír tú tær, hvat ynskír tú tær - Royn um tú kanst tekna - Hvat tú ynskir tær at fá ", soleidis syngja børninum í dag tá fø›ingardagur er.

Øll minnast væl fra barnaárununum ymsar magiskar ramsur, sum settu væntanina í hásæti. Sjálvt um tú nú ert blivin rættuliga vaksin, sleppur tú ikki undan eini lítlari gávu, hóast tú altso ikki sleppur at tekna› hana. Ta› skal vera mín vón at gávan kann brúkast.

Eitt er so víst - eitt gavukort til Fragd og Fimi - ta› er óney›ugt!

Eg sendi ísta›in eina pr‡›iliga myndaskrá, sum gjørd var› til stóru afturlítandi frams‡ningina vi› myndum Preben Hornungs. Heiti er: "Preben Hornung - Billeder" (maleri og tegning 1948-1989). Hann doy›i sama ári› mururin fall, og hev›i hann liva›, var hann álei› javngamal vi› teg, 81 fyri at ver›a heilt nágreiniligur.

Frams‡ningin er í løtuni í Århus, men ver›ur eisini at síggja til várs á Kunstforeningen Gammel Strand, har tú kanska fært høvi at vitja. Ta› sjáldsama í hesi myndaskrá eru tær mongu áhugaverdu greinarnar, eitt nú av máláranum Peter Brandes og so Erik Steffensen. Sum tú sært í myndarø›ini aftast í skránni, og helst longu vart grei›ir yvir, eru tit bá›ir felags um at dyrka teir svørtu, rey›u og hvítu litirnar, eins og ta› kompromisleysa málarasyndromi›, sum – sagt í skemti – ikki fær tykkum frá staffelinum. Ikki kann eg lata vera vi› at endurgeva ta›, Hornung einafer›ina seg›i í hesum sambandi, tí ta› hóskar eisini so væl til tín “Jeg bryder sablen og bekender mig til billedet på væggen - den stangreaktionære linie - den der holder af billedet".

Eg síggi í yvirlitinum yvir ævisøgu hansara, at tít ba›ir hava gingi› á akademinum sama tí›arskei› undir krígnum og sostatt hava havt Kræsten Iversen og Aksel Jørgensen sum lærarar - og tískil kundi bókin eisini havt tín áhuga.

Svart skínur sólin í Skálanum í løtuni - og líka so nógv sum eg frø›ist yvir frams‡ningina sum heild, so glei›ist eg yvir at Skálin hevur megna› at ogna sær ta› einastandandi, bæ›i í stødd og ví›ari merking, stóra verki› "Í náttarsól og óve›ursstjørnum”.

Eg vitja›i ta› afturlítandi frams‡ning tú hev›i í Randers fyri tveimum árum sí›ani - og hon var heilt klárt naka› anna›. Men eg var líka so fegin sum bilsin yvir, ta›, i› tú hevur at vísa fram hesu fer›ina herheima. Havi vitja hesa frams‡ningina vi› næmingunum hjá mær, og skal man tosa í teirra nútí›ar málbur›i sum er halvt "enskt-amerikanskt" sum troubadururin speiandi kvø›ur, so er talan um ta› "coolasta" "power" og "turbo" eg havi merkt mær í longri tí›. Saman vi› næmingunum.

Summa sta›ni yvirgongur tú teg sjálvan - og uttan at taka munnin ov fullan og gera eina halgisøgu burtur úr, meini eg, at tú ongantí› hevur veri› nærri tí› natúrliga, reina málninginum enn júst nú.

Per Kirkeby hevur í einari frálíkari eftirskrift til heimspekingin Merleau-Pontys "Cezannes tvivl" skriva› um sama fyribrigdi, han rópar "det normale maleri":

“Cézanne malede altid et normalt maleri, et maleri uden indholdsmæssige eller formale sensationer.. han var aldrig eksotisk..og han forsøgte aldrig at gøre dem interessante.. De var malet ganske direkte. Det er et normalt maleri.. At male sådan kræver en særlig form for naivitet. Ikke den første, uskyldige og uvidende naivitet. Men den indsigtsfulde, tilkæmpede naivitet, der så at sige er på den anden side af dannelse og viden. Det kræver mod at lægge det "intelligente" sikkerhedsnet bag sig. Og så alligevel arbejde sejt, møjsommeligt, systematisk"

Hesi or›ini kundu eins væl veri› skriva›i um tær flestu av myndunum, sum opinbera seg uppi í Skálanum í løtuni. Tín leitan eftir harmoni kemur t‡›iliga fram. Tema og beinagrind eru enn eina fer› nátturan, menniskja›, kvinnan. Tó uttan at ta› sn‡r seg um endurtøku, ella um at taka vi› ta› abstrakta myndamáli›, bara av sær sjálvum, ella fyri at vera mótamerktur.

Tú hevur helst nógv um oyrini í løtuni. N‡t bara aldursins "arrogancu" og lat telefonina ringja! Á hesum sinni fært tú tískil ikki eitt fullfíggja› ummæli av frams‡ningin. Men nakrar hugle›ingar um ein part, slepst ikki undan.

Til tess mugu vit eina fer› út í ta› gráa. Teir svartu og myrku moll-tónarnir hava veri› umrøddir nóg so ofta. Skal eg vísa á ta›, sum hugtekir meg mest - eisini á hesi frams‡ning - er ta› tann grái litheimurin.

At grundgeva fyri hvat man sansar og ver›ur bergtikin av, er ofta trupult, men í hesum føri vil eg grei›a frá, hvat ein kann uppliva vi› at spáka frá mynd til mynd á verandi frams‡ning.

Hvørja fer› eg eri í Skálanum fari eg inn í tína pyramiduhøll og gangi beina lei› til "Gráur morgum"(1970). Grátt út yvir grátt halda kanska nógv. Og ta› er partvíst rætt, og tí ikki uttan grund, at Finn Termann Frederiksen í "Rød Regn" rópar júst hesa mynd "mærkelig". Framman fyri henni stndi eg mangan og mediteri. Og ta› er alt eftir ljósvi›urskiftunum ein n‡ggj mynd hvørja fer›. Á einum gráve›ursdegi uttan elektriskt ljós ver›ur man púra burtur í myndini, tí hon livir og glø›ir! - óiva › grunda› tær nógvu glæringarnar og jør›litirnar.

Eg haldi ikki ta› er mest spennandi, at man kann eydnast at síggja tvey motiv í myndini, sum Termann Frederiksen grei›ar frá. Eg upplivi ta› sum "bara" grátt - ein metta›an gráa, sum er rein atmosfera - okkara litver› - ella í minsta lagi gevur assosiatiónir til ta› sermerkta nor›urlendska í litum. Grátt kann kennast bæ›i dapurt, skiti› og køvandi, men eisini djúpt og andbori› - sum her - og ta›, tú sum áskó›ari kennir er hvørki meiri ella minni enn ta› háleitta - ta› "sublima", at tú ver›ur drigin inn í eina a›ra dimensión - at marki› millum nattúruna og teg ver›ur flótandi. Man speglar sær so at siga í hvørjum ø›rum. Tú noy ›ist at skapa myndina sjálvur, tí myndin hvat litum vi›víkur er so beinrakin. Eg kenni ongan uttan kanska Gerhard Richter (f.1932) sum í tí gráa tí›arskei›num í 70'unum hevur bjó›a› ásko›aranum só nógv av, sum tú. Hann fór jú heilt út í ta› ekstrema og mála›i 2 fer›ir 3 metur vi› einstátta›um gráum, sum t.d. í "Grátt" (Stadtliches Kunstmuseum Bonn).

Takk og lov sleppur tú ongantí› umhvørvinum, tí vit kunnu sansa og sum menniskju eru felags um at kunna uppliva saman.

Hvør grundin í ví›ari merking er, fyri at grátt hugtekur so nógv, havi eg sjálvandi roynt at útgreina›. Og kanska finna vit eitt svar í teimum fysiologisku ey›kennunum, sum Goethe granska›i. Hann fann fram til at eyga › sjálvt rúmar bæ›i ljós og myrkur - altso eru aktiv: er nógv ljós, roynir eyga› at skapa myrkur vi› at lata seg aftur, og um ov myrkt er, skapar eyga› ljós vi› at opna seg.

Ta› er kanska banalt, men hevur stóran t‡dning, tá vit tosa um grátt og um vi›urskiftini millum ljós og myrkur. Tá myndin hjá tær er vor›in ein "ikon" fyri mær, hevur ta› havt sína rót í hesum "spæl". Í doktararitger›ini "Den farvede verden" (Jacob Wolf 1990) granskar høvundurin ví›ari í sporunum hjá Goethe, og umrø›ur eisini teir fysiologisku litirnar í sambandi vi› málningalistina, og har finni eg ein lykil til ein part av listaheiminum hjá tær:

"Det vågne øje viser, at det er levende ved, at det forlanger afveksling. det befinder sig altid i en tilstand af bevægelse fra det mørke til det lyse og omvendt. Øjet kan og må ikke forblive i en særlig, i en ved objektet specificeret tilstand. Det stræber mod en helhed, som det opnår ved selv at skabe en opposition til det, det påvirkes af. Det ekstreme sættes op mod det ekstreme, det mådelige sættes op mod det mådelige, øjet deler, og det forener, ved straks at forene det modstillede og stræbe mod en helhed i succession, såvel som i samtidighed.

Man kan komme ud for, at en sådan ideel helhed er skabt for øjet i det halvlyse, farveløse maleri, og det gør et overordentligt behageligt indtryk på øjet. Måske skyldes det netop, at her møder øjet en helhed, som det ellers selv skal frembringe, og som, hvis det lykkes, aldrig er i stand til at fastholde".

Ta› er tann harmoniur - tann heild, sum man finnur í “Gráur morgum”, og sum hevur vakt ans. Stór var frøin, tá eg varna›ist, at frams‡ningin millum mangt anna› tekur henda tátt upp aftur. Ella vísur, at tú ongantí› hevur slept tí gráa heiminum.

"Háveturssti›" (nr. 13 á frams‡ningini) er ein einastandandi mynd! Brei›, djørv, rútmisk pensilstrók og djúpdarvirkandi glæringar - flata og rúm samstundis og ein rúgva av gráum litbrøgdum, - heilt uttan primerlitir, hóast grønt og gult kagar fram í heilt smáu brotum. Har er bæ›i kontrast, tí svart blandar seg uppí, men eisini harmoni. Og eg síggi ta› sum eitt ta› besta dømi uppá ta›, eg á›ur havi umrøtt sum "det naturlige maleri".

Naka› av tí sama finni eg - burtursæ› frá einum heilt spennandi ekspressivum klattuttum pensilarbei›i (taranum sjálvum) og einum heitum okkerdominsi - í tí frálíka "Hellugrót móti taranum"(nr 15 á frams‡ningini).

At taka dagar ímillum er ringt - tí frams‡ningin øll sum hon er, er av hægstu gó›sku og eitt avrik, sum seint fera í gloymíbókina. Tí ongin ivi er um, at tú hevur megna› at endurn‡ggja teg og fevnir ví›ari enn eg á›ur havi sæ›.

At enda komin, vil eg fegin tríva í tær mongu vatnlitismyndirnar – sum eg gjørdist ovfarin av. Tú greiddi mær einafer› í 89 ógvuliga varin og sjálvkritiskt frá um tú mála›i vi› vatnlitum (akvarel): "..ta› føli eg ikki at duga til. Eg havi roynt akvarell enttá fleiri fer›ir, og haldi ikki ta› hevur líkst nøkrum eina einasta fer› (látur).”

Eg frøist yvir, at tú umsí›ir hevur fingi› áræ›i! Vinfólk í Århus greiddu mær fagna›arrúsandi frá frams‡ningini í Galleri Profilen í februar 99, har tú s‡ndi framm vatnlitismyndir. Og eg havi sí›ani øvunda teimum upplivingina. Ta› er ey›synt, at tann føroyska ásko›arfjøldin eisini hevur tiki› dygdina í hesi líttillatnu, men virtuosu litrannsóknum til sínum. Uttan mun til, um vit eru í teimu heitu økjunum (eg bleiv heilt burtur í teimum rey›-kopar-gulligu-akkordunum í nr. 31 "Fjall í koparlóga - hon er sfærisk og jar›bundin á ein heilt serligan hátt og minnir ikki sørt um ta› litspæl, sum fer fram, tá Nólsoyggin ro›ar) – ella í tí stillføra grá-kalda og meiri neutrala-skalanum (sum t.d. í tí hugtakandi nr. 30 "Vallari, ste›ga og sjá"), so eru avrikini einastandi, og enntá so nógv í tali!

Tey or›ini, sum Henrik Wivel n‡tti, í einum rósandi ummæli› av Profilframs‡ningin undir yvirskriftini "Færøsk vitalitet", kundu eins væl l‡st vatnlitismyndirnar í Skálanum. Hann tosar m.a um "en med alderen vundet ny og anderledes umiddelbarhed” - og um vatnlitirnar serstakt, at: "Men det er en anden oplevelse at se Reyni som akvarel-maler, netop fordi hans maleriske gestus i så høj grad er forbundet med oliefarven, dens stoflighed og ælte. Men også den mere sarte, vandgennemlyste akvarelteknik klæder Reyni, der forenkler, så de små billeders tegnkarakter bliver fremtrædende"(Berlingske Tidende 3/2-99)

Eg kann leggja aftrat at ta› tekn-líknandi evni í fleiri myndum, t.d. nr. 34 "So vónrík og flugvandi gla› tey fara framvi›" og nr. 32 "Septembur 2000", minnir ikki sørt um kalligrafisku tusch-málningarnar, tú hevur mála› fyrr. Men tekn-sambandi› er eisini innihaldsligt í tann mun, at ta› er dømi um – sum Paul L Cour einafer› seg›i í “Fragmenter af en Dagbog”: “Vi må aldrig glemme, at alle kunstarters inderste sprog er tegnet. Det var ikke imitationen, men det gådefulde tegn, som vi fylder med al den menneskelighed, det kan bære".

Hetta er lættari sagt enn gjørt.

Bár›ur Jákupsson samanbar teg í rø›uni í Nor›urlandahúsinum herfyri vi› Hokusai, ein rø›a, sum eisini er endurgivin í skránni til frams‡ningina.

So kann eg eisini loyva mær, uttan at tú skal smæ›ast, at samanbera títt avrik innan vatnlitir vi› Turner, tá hann var bestur. Í teimum bestu myndunum ert tú heilt fjø›urkendur og lættur: ein, í mesta lagi tveir, litir – ein flati – nakrar fáar dynamiskar strikur og allíkavæl eitt fullbori› verk. Eitt frálikt dømi er tann gul-gráa myndina nr. 30. Títt myndamál er so klart, sum ongantí› á›ur.

Mín heilsan er vor›in nóg so long. Men eg gevist ikki uttan eina lítla frágrei›ing um, hvussu nøkur ungfólk upplivdu frams‡ningina. Í samband vi› litfrálæru á mi›stigi í evning (tey hava 4 tímar um vikuna) vitja›u vit frams‡ningina. Ta› var ey›s‡nt, at tey flestu fordjúpa›u seg í vatnlitismyndunum. Vit høvdu júst lært fyribrigdini litkontrastir, ljósvir›i og litgó›ska. Flokkurin hev›i eisini sæ› filmin "Lyset, mørket og farverne" um harmonisku litlæru Goethes. Tá vit gevast fyri jól skulu vit síggja "Svartur Sannleiki” og tey skulu gera eina stutta skrivliga frágrei›ing um eitt verk, sum tey sjálv dáma. Sum stikkor›, ella í telegrammstíli, um tey vilja. Fleiri gjørdu eisini lítskitsur, sum eg vóni tú fært høvi at síggja onkun dagin. Men ta›, eg vildi siga var, at tey raka beinavegin inn á bein í tíni frams‡ning “Formurin sjálvur minnir um ein ella tveir japanskar bókstavir", skriva›i ein næmingur um nr. 32 "September 2000" Og eg vil enda vi› at endurgeva eina næmingafrágrei›ing, beint sum hon var› skriva›. Ta › sn‡r seg um mynd nr. 34 "So vónrík og flúgvandi gla› tey fara framvi›", sum vi› øllum ungdómsins vi›spælandi lyndi á besta hátt l‡sir, at list og aldur ongi mark hava. Ta › krevur "bara" eitt opi› sinni av listamanni og ásko›ara:

"Litirnar fanga eyga ›
beinavegin. Í hesum bílætinum sær man ta› beinanvegin - spæli› ímillum ta›
heita og kalda-
millum lív og dey›a
heysti› og vári› dansa saman
litirnir eru heitir og kaldir
myrkabláar feitar strikur
vi› eitt sindur av grønum, svørtum ella gráum uppií kanska paynes-grey ella okkurt
linjurnar í hesum litinum eru beinar, kantutar
eitt sindur f‡rakanta›ar
ni›ast í høgru sí›u er ein myrkur blettur
f‡rakanta›ur næstan
ein mynd av einum manni
teir heitu litirnir hava runt skap
nógv røring - teir dansa nærum
ein mynd av eini kvinnu
hesir eru orange og rey›ir
tey dansa saman
ljós og myrkur
dag og nátt
morgun og kvøld "

Eg hugsa›i, at tú neyvan kundi fingi› eina betri heilsan, eisini tí ta› er so sjálvdan at listafólk fær høvi at hoyra a›rar røddir enn tær professionellu!

Enn einafer›: hjartaliga tillukku vi› degnum og ikki minni vi› teirri storfingnu frams‡ningini.

Frá frams‡ningini í Listaskálanum: Hellugrót móti taranum, 2000

Jens Kristian Vang

Jens Frederiksen er lektari vi› Føroya Studentaskúla har hann undirvísir í myndlist og donskum.

Jens hevur sí›ani 1982 gjølla fylgt vi› gongdini í listini hjá Ingálvi av Reyni og hevur skriva› tekst til skránna til frams‡ningina hjá Ingálvi á Bornholms Kunstmuseum í 1992.

Umframt at undirvísa arbei›ir Jens sum málari og hevur m.a. veri› vi› á Várframs‡ningini sí›ani 1994.